# Hugni og virtuositetur

**Bergur Godtfred ummælir konsert við Astrid og Stanley Samuelsen í Miðlahúsinum**

## Ummæli



**Bergur Godtfred**



*Stanley Samuelsen spældi saman við dóttirini Astrid*

*Mynd: Jan Müller*

- Eg eri so nervøsur. Tað eri eg altíð í byrjanini, men tað gongur nokk skjótt yvir. Tað plagar tað at gera, sigur ein ærligur og viðkomandi Stanley Samuelsen, tá ið hann trínur fram á pallin í Miðlahúsinum friðarliga og vakra hóskvøldið 24. apríl.

Tað angar av nýgjørdum kaffi, smákøkur eru á borðinum, og stemningurin er linur og lættur. Frú Stanley, ið eitur Merete Messmann og er fyriskipari og umboðsfólk hjá Stanley, selur atgongumerki, bjóðar vælkomin og prátar við fólk. Fólk heilsast og práta, og tað er eyðsýnt, at fleiri kennast, men tað er sum at trýsta á ein "muteknøtt", tá ið Stanley vendir sær til áskoðararnar – fólk eru til reiðar at lurta og njóta. Stanley biður gott kvøld og sigur, hvussu skráin fyri kvøldið sær út. Vit hava nógv gott í væntu av frálíkum sangum – gomlum sum nýggjum, tónleiki og guitarspæli, og serliga forvitnisligt verður at hoyra hann og dóttrina Astrid.

Tú skalt vera eitt sindur nervøsur, skalt tú gera títt besta, er pástandurin frá fólki, ið hava skil fyri slíkum, og alt er, sum tað skal vera, tá ið Stanley hevur stemmað handbygda Flatbushguitarin frá Victor Smith í Norðursælandi. Ljóðútbúnaðurin er væl innstillaður til hølið, so natúrliga akustiska ljóðið sum vanligt er framútskarandi. Oyrini hungra eftir vælljóði, og Stanley er ikki pírin. Guitarurin ljóðar sum eitt heilt flygul. Eitt er at spæla so einastandandi væl, sum Stanely, men at gera tað frá byrjan, tá ið tú ert eitt sindur nervøsur og ikki hevur hitað upp, tað er professionalisma. Stanely spælur sum ein dreymur frá fyrsta tóna, og sjálvt um fingrarnir eru eitt sindir stívir í byrjanini, fær hann altíð væl og virðiliga hálað alt í land.

Stanley hevur evnini til at fáa alt at hanga saman. Løg, tekst, sang, tónleik og tulking. Framførslan er ein heild, ið er stykkjað saman av einari mongd av smálutum, ið ein og sami maður fær at hanga saman. Tað er synergieffekt, tá ið summin av smálutum er meira saman enn hvør sær. Alt stuðlar upp undir hvørt annað, og tú verður so at siga sogin inn í ein transcendentan heim av andligum og skaldsligum huglagi. Tað hoyrist, at Stanley hevur arbeitt við tilfarinum í mong ár og hevur røtur aftur í sálmar og føðilandssangir eins og fólkatónleik og 60'araballaður. Nostalgi merkir bæði heimlongsul og longsul eftir farnum tíðum, men Stanley hevur evnini at føra okkum gjøgnum eitt langt tónleikatíðarskeið, og er ein sambindingarliður frá fortíð til nútíð og framtíð. Hann megnar at geva sálaðum yrkjarum nýtt lív og halda lív í hálvdeyðum nostalgikarum. Spell, at fleiri av teimum yngru ikki enn hava varnast ikonið og idolið frá 60'unum, ið kundi givið teimum innlit í fortíðar, samtíðar og framtíðar skalda- og tónleikamentan á slíkan virtuosan hátt. Í Danmark elska tey at hoyra Stanley, tí tey siga, at hann kann geva teimum eina ferð til Føroya, uttan at tey skulu hava baksið av at sigla ella flúgva langa og dýra teinin.

### Dóttirin spældi eisini

Flestu sangirnar hava vit hoyrt fyrr á fløgu ella live, men tað, sum undrar hvørja ferð, er, hvussu nær ljóðið á pallinum er ljóðinum á fløgunum, tí eitt er at kunna sita og yvirspæla og fínpussa í einum studio í tímavís og so sita við einum guitara og skula raka hvønn einasta tóna snórabeint og við fyllu. Og Stanley spælir hópin av tónum uppá sera stutta tíð. Stanley avdúkar, at hann arbeiðir við at geva eina nýggja fløgu út. Fjepparar vildu sagt, at tað var uppá tíðina, tí vit hava bara fingið tvær fløgur í níggju ár, men Stanley er lítillátin og eyðmjúkur listamaður, ið ikki hellir plagiatir og dusinvørur út yvir fólk. Stanley spælir síðsta sang í fyrra hálvleiki áðrenn steðgin við kaffi og køkum og lovar at leiða dóttrina inn eftir steðgin.

"Jeg er så nervøs", sigur dótturin Astrid fleiri ferðir, tá ið Stanley hevur presenterað hana, men hon ger tað so ærliga, dámliga og umberandi, og fólk eru fyrikomandi og møta henni við klappum og mildum látri, so hon fær dirvi og yvirskot til at syngja og spæla so hugtakandi, at tú gloymir tíð og stað. Tað er undranarvert, at tú kanst syngja, spæla og upptraðka so væl, tá tú bara ert 19 ár og "nervøs". Tað kanst tú væl bara gera, tá ið tí hevur slíkan lærumeistara við liðina, sum samstundis er pápi tín, og sum tú samstundis kanst líta fult og fast á, at han hálar alt í land, um á stendur. Og tað hoyrist, at tey hava spælt saman fyrr. "Hon hevur tað við at róta eftir gomlum sangum serliga í hasum 60'ara rótikassanum", sigur Stanley skemtandi um dóttrina. Tey syngja nakrar Beatles, McCartney, Harrison, Simon & Garfunkel og aðrar 60' og 70'arasangir, áðrenn Astrid sjálv sleppur at royna seg. Hon hevur eina reina, blíða og fitta rødd, sum eisini er sigandi og livandi. Tað kemur serliga fram, tá ið hon spælir og syngur ein cubanskan sang á flótandi sponskum. Tað er væl frágingið í so ungum aldri, og tað er at kalla ongantíð nakað serligt amatørkent yvir framførsluni – bert nakað ungt, sakleyst og meinaleyst.

So er tað knappliga liðugt. Tíðin er flogin avstað. Tú hevur verið í einum øðrum hugaheimi – ja, einum øðrum alheimi. Fólk vilja ikki so lætt sleppa teimum, og lukkutíð ella tilvildarliga, sum Stanley so skemtingarsamt sigur, hava tey eitt eykanummar – enn ein vakran klassikara frá 60'árunum. "Jesus pápi veri við tykkum", er – sum vanligt – Stanleysa útgangsbøn, sum vit kunnu fara víðari við út í kvøldið, náttina og langa vikuskifti. Byrjanin til eitt frálíkt kvøld er komin at enda.

Sosialurin